



**Endamálið við dagligdegnum er:**

at geva børnunum ein góðan og innihaldsríkan dag í tryggum og barnavinarligum frítíðarumhvørvi.

at samstarvið er gott millum børn, foreldur og starvsfólk.





at vit vísa tolsemi og læra at loysa trupulleikar, ið dagliga kunnu koma fyri.

okkara ynski er at, ígjøgnum spæl, ítriv, hugna og felagstiltøk, at menna og styrkja sjálvskensluna, sjálvsálitið og sjálvsvirðið hjá tí einstaka barninum.



eisini er ynskiligt, at børnini fáa brúkt teirra skapandi evnir, so sum handalig, rørslulig, og innan framførslu og sang.



okkara mál er, dagliga at gera brúk av umhvørvinum, frítíðarskúlin liggur í; hagin, fjøran, vøllurin og høllin, ið eru sera týdningarmikil og avbjóðandi fyri hugflogið og ymiskar rørslur.



vit vilja eisini ígjøgnum sang, søgur og prát taka kristindómin inn í frítíðarskúlan.



frítíðarskúlin er barnsins frítíð og verður tí, tað mesta, ið vit takast við, í samráð við børnini. Lurtað verður eftir barnsins ynskjum og roynt, at nøkta teirra ynski innanfyri tær breytir vit dagliga hava at bjóða.

vit leggja stóran dent á tónalagið og hvussu tosað verður við hvønn annan og um hvønn annan, at vit eru vinalig og fyrikomandi ímóti hvørjum øðrum, og tosa pent um og vira heimini hjá hvørjum øðrum.









***Gjald og uppsagnartíð***

Gjaldið er---950---kr um mánaðin.

Søkjast kann um fripláss. Tosa við leiðaran um so er.



Um barnið gevst í frítíðarskúlanum, skal boðast frá í seinasta lagi ein mánað frammanundan, galdandi frá 1. í mánaðinum.

Børn, ið eru sjúk eiga ikki at koma í frítíðarskúla.



***Máltíð:***

Kemur barnið í frítíðarskúla áðrenn kl. 11:30, má tað hava matpakka við, til at eta kl.11:30.
Hetta kemur fyri Hósdag og fríggjadag.



***Millum máltíð:***

Frítíðarskúlin gevur mjólk, frugt og okkurt afturat til millum máltíð, umleið kl. 14:45 ella 15:00


